## Burka helst bannað

Ein nevnd hjá franska tjóðartinginum mælti í gjár tinginum til at banna muslimskum kvinnum at ganga í burka ella øðrum plaggi, sum fjalir alt andlitið. Verður tann endaliga lógin orðað eins og tilmælið frá nevndini, kunnu muslimskar kvinnur ikki brúka burka og líknandi pløgg í skúlum, á sjúkrahúsum ella í býbussum og tokum. Hinvegin kunnu tær ganga í slíkum klæðum úti á gøtuni. Kanningar frá myndugleikunum vísa, at umleið 2.000 muslimskar kvinnur í Fraklandi brúka burka ella annað plagg, sum fjalir allan kroppin.



## Sleppa undan skuld

Heimsbankin, Altjóða Gjaldoyragrunnurin og aðrir kravánarar hava gjørt av at strika 1,6 milliard dollarar ella 8,4 milliardir krónur, sum Afghanistan skyldaði teimum. Heimsbankin og IMF staðfesta samstundis í einari felags kunngerð, at búskaparligar nýskipanir í Afghanistan hava eydnast væl. Ein talsmaður fyri IMF sigur við AP, at hóast skuldin er strikað hevur Afghanistan framvegis stóran tørv á útlendskari hjálp. Hann leggur afturat, at tann afghanska stjórnin noyðist at útvega tí almenna fleiri inntøkur, at gera íløgur í samferðslukervið og at leggja ætlanir um at basa fátækradøminum.

# Vinnan noyðist at kunna keyparar um burðardyggleika

**Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, heldur, at spurningurin um burðardyggleika í føroyskari fiskivinnu, í fyrsta lagi er ein spurningur um marknaðarføring, sum vinnan eigur at taka sær av. – Her liggur ein avbjóðing hjá okkara vinnu, sum helst skal raðfestast hægri í tíðum sum koma, sigur hann**

BURÐARDYGD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Fyrstu stigini til marknaðarføring av føroyskum fiski eigur vinnan at taka, heldur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard*

Í síðstu viku settu Bjørt Samuelsen, løgtingskvinna og Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacobi Vestergaard, spurningar, sum snúðu seg um burðardyggleika í føroyskari fiskiveiði.

Ein av orsøkunum til hesar spurningar var, at vit í Miðlahúsunum herfyri tóku upp trupulleikan, sum Føroyar hava við sølu av virkaðari føroyskari hýsu í Bretlandi og harvið lága hýsuprísinum, sum skip og bátar hava fingið á marknaðinum.

Bretskar handilsketur hava nevniliga boykottað hýsuvørur virkaðar úr føroyskari hýsu, tí tær meta, at okkara hýsuveiða er ikki burðardygg.

### Marknaðarføring

Í sínum svari segði landsstýrismaðurin, at myndugleikin gevur sítt ískoyti til at greiða vinnuni frá, hvussu okkara fiskiveiðiskipan virkar.

– Tað er mín vón, at vinnan kann bera okkara boðskap víðari á sínum marknaðum, soleiðis at fiskurin kann seljast til bestu kundarnar.

Hann segði, at trupulleikarnir, sum føroyingar hava við eitt nú hýsu á bretska marknaðinum, eru ein spurningur um marknaðarføring.

– Eftir mínum tykki er tað í fyrstu atløgu vinnan, sum eigur at taka sær av at marknaðarføra okkara fiskavørur sum burðardyggar. Okkara fiskidagaskipan er góð, tá havt verður í huga, at vit hava økisfriðingar, gýtingarfriðingar, eins og skipatal og fiskidagatal áhaldandi minka, legði hann aftrat.

### Áhaldandi tillaging

Jacob Vestergaard helt, at eftir hansara tykki skal spurningurin um burðardygd ikki bara viðgerast við støði í samanberingum millum fiskidagatalið, ið løgtingið ásetir og tilmælið, sum fiskifrøðin kemur við.

– Vit arbeiða áhaldandi við tillagingum, sum tryggja burðardygga fiskiveiði, og vit halda hesi tillaging við líka, sum landsstýrismaðurin tók til.

Sum dømi um slíkar tillagingar, segði Jacob Vestergaard, at ein lækking í fiskidagatalinum áhaldandi fer fram, eins og færri og færri skip troyta okkara grunnar.

– Runt roknað er talið av fiskidøgum lækkað við sløkum 40% fyri stór fiskifør og við sløkum 30% fyri útróðrarbátar síðan 1997/1998. Haraftrat er talið av trolfríum økjum økt munandi seinastu árini.

### Umfatandi friðingar

Landsstýrismaðurin segði, at hann sjálvur tók stig til at steingja trý øki seinasta summar.

– Júst nú arbeiða fólk innan fiskivinnuumsitingina við spurninginum um at steingja nøkur øki innari fyri at verja tosk og hýsu. Haraftrat kemur, at eingi størri fiskifør kunna royna innanfyri 6 fjórðingar, og trolveiða kann í høvuðsheitum ikki fara fram innan fyri 12 fjórðingar.

Jacob Vestergaard legði dent á, at øll hesi tiltøk stuðla undir eina burðardyggari veiðu, og endamálið er at tryggja, at hesar tillagingar áhaldandi vera dagførdar, soleiðis at vit eisini tryggja okkum eina burðardygga hýsuveiði.

*- Runt roknað er talið av fiskidøgum lækkað við sløkum 40% fyri stór fiskifør og við sløkum 30% fyri útróðrarbátar síðan 1997/1998. Haraftrat er talið av trolfríum økjum økt munandi seinastu árini, sigur Jacob Vestergaard*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*




# Tvey línuskip og tveir ísfiskatrolarar landa



*Pól Fuglø er landingarformaður í Klaksvík*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Línuskipið Jákup B seldi væl, tá teir eftir stuttan túr undir Føroyum landaðu mánadagin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línuskipið Jákup B landaði sløk 50.000 pund í Klaksvík í mánadagin. Teir seldu um uppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya og fingu góðan prís - slakar 15 krónur í miðal fyri kilo.

Jákup B hevði einar seks setur á túrinum, og meginparturin av veiðini var hýsa.

Í dag landar trolbáturin Fiskaklettur í Klaksvík. Mánadagin, tá teir boðaðu frá landing, høvdu teir umleið 14.000 pund inni.

Pól Fuglø, landingarformaður í Klaksvík, sigur, at línuskipið Klakkur kemur inn at landa í morgin, og Ågot kemur fríggjadagin.

Klakkur er undir Føroyum, og Ågot er á Íslandsrygginum.

Ísfiskatrolararnir Safir og Smaragd koma eisini inn at landa fríggjadagin, og sum skilst, hevur fiskiskapurin hjá teimum verið hampiligur.